# Sámal Petur sigur ósatt



Nógv spurnartekin eru í kjalarvørrinum á Sámal Peturi í Grund í hesum døgum

**Tað er beinleiðs ósatt, tá Sámal Petur í Grund sigur, at eg havi biðið landsnevndarumboð Sjálvstýrisfloksins blokera aðalfundin, sigur Edvard Hermansen**

FLOKSSTRÍÐ

*Edvard Joensen*

– Sámal Petur í Grund sigur ósatt, tá hann leggur meg undir at hava biðið fólk um ikki at møta á aðalfundi fyri at forða fyri, at fundurin gjørdist viðtøkuførur, sigur Edvard Hemansen, formaður í landsnevnd Sjálvstýrisfloksins.

Sámal Petur í Grund, politiskur formaður Sjálvstýrisfloksins, sigur við Sosialin, at hann veit frá landsnevndarlimi Sjálvstýrisfloksins, at formaðurin í landsnevnd floksins, Edvard Hermansen, upp undir lands- og aðalfundin í Klaksvík leygardagin, ringdi til landsnevndarumboðini og bað tey ikki møta á fundi, soleiðis at fundurin ikki gjørdist viðtøkuførur.

Sámal Petur í Grund nevndi landsnevndarumboðið hjá Suðurstreymoyar Sjávstýrisfelag, Ronald Poulsen, sum skuldi hava fingið hesa áheitan.

Við Sosialin sigur Ronald Poulsen seg ikki hava fingið eina slíka beinleiðis áheitan frá landsnevndarformanninum. Hann váttar tó at hava tosað við Edvard Hermansen, men segði, at slíka áheitan hevði hann ikki fingið. Hann hevði í øllum førum ikki skilt samrøðu teirra soleiðis, sum Sámal Petur í Grund leggur hana út.

Edvard Hermansen vísir á, at tað vóru tvey av trimum limafeløgum á fundi. Einasta landsnevndarumboð, sum ikki møtti, var umboðið fyri Eysturoyar Sjálvstýrisfelag, sum er felagið hjá Sámali Peturi í Grund. Heldur ikki varamaðurin møtti. Og hann er formaður í felagnum í Eysturoynni.

Edvard Hermansen sigur, at hann hevur veruliga í longri tíð roynt at hitta landsnevndarumboðið í Eysturoynni í felagsørindum, men tað hevur ikki eydnast. Somu royndir hevur Sosialurin gjørt líka síðan landsfundin í Klaksvík leygardagin. Heldur ikki formaðurin í Eysturoyar Sjálvstýrisfelag hevur verið at hitt, tá Sosialurin hevur roynt at fáa orð á hann. Aðrir nevndarlimir í Eysturoyar Sjálvstýrisfelag hava eisini borið seg undan at siga nakað um málið.

Sámal Petur í Grund váttar, at hann hevur stillað seg sjálvan upp til formansvalið í Sjálvstýrisflokkinum. Áheitanin er ikki komin frá nøkrum lokalfelag, men frá onkrum einstøkum, vanligum limum í flokkinum, sigur hann. Men sambært lógum floksins, skal eitt lokalfelag ella ein fólkavaldur politikari stilla eitt valevni upp, og tað gjørdi hann so sjálvur.

Hann sigur eisini, at eftir at hann var skotin upp sum formansvalevni, fekk hann váttan frá nevndini í Eysturoyar Sjálvstýrisfelag um, at hann skuldi fáa atkvøðurnar hjá felagnum á aðalfundinum. Tað varð avgjørt á fundi tann 25. september. Hesar upplýsingar hevur Sosialurin fingið váttaðar frá nevndarlimi í Eysturoyar Sjálvstýrisfelag.

Søgur ganga um, at Sámal Petur í Grund hevur so lítlan politiskan stuðul í valfelag sínum, at hann kanska als ikki verður uppstillaður til val.

Sámal Petur í Grund sigur, at hann so seint sum í vikuni, sum fór, hevur fingið at vita frá formanninum í Eysturoyar Sjálvstýrisfelag, at felagið ætlar at stilla hann upp til løgtingsvalið.

## Fullveldi er ikki ein spurningur um pengar



– Pengarnir binda okkum niður í fullveldisspurninginum, sigur Jákup Mikkelsen.

Klaksvíkingurin Jákup Mikkelsen heldur fyri, at búskaparligu argumentini bert eru foringar fyri fullveldi, sum í veruleikanum einki hevur við pengar at gera, heldur hann

Millum tey, sum tóku orðið á landsfundi Fólkafloksins var Jákup Mikkelsen úr Klaksvík. Navnin hjá kenda málmanninum tosaði einamest um ríkisrættarligu viðurskiftini, og tað var heilt greitt, at hetta er eitt evni, sum liggur honum rættiliga nær.

Á fundinum nýttan høvi til at skjóta upp, at Fólkaflokkurin stillar upp saman við Tjóðveldisflokkinum, og hetta kundi verið undir navninum hjá Sjálvstýrisflokkinum, tá ið lógin ikki heimilar listasamgongum.

Hann talaði greitt fyri, at Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin skuldi finna saman aftur eftir næsta val, og Javnaðar- og Sambandsflokkurin koma slett ikki upp á tal, men hann segði einki um Sjálvstýrisflokkin.

– Sjálvstýri er ein spurningur um ábyrgd. Tað er absurd at seta treytir við sjálvstýri. Pengar hava heldur einki við sjálvstýri at gera, sigur Jákup Mikkelsen, sum eisini fekk onkra viðmerking frá fleiri av oddamonnunum í flokkinum.

– Pengarnir binda okkum niður í fullveldisspurninginum, sigur Jákup Mikkelsen.

Hann rósti eisini leiðsluni í flokkinum fyri at ganga røttu leið innan fullveldismáli, men lat onga iva vera um, hvønn vong í flokkinum, hann hoyrir til.

# ítróttur

Nr. 214 • týsdagur • 6. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Stórsigur til Julian og Hull

**Føroyski miðvallarin telist millum mest álitisfullu spælararnar hjá Brian Little**

ONGLAND

*Jóannes Hansen*

Tað gongur avbera væl hjá einasta føroyska spælaranum í eingilskum vaksnamannafótbólti. Landsliðsmaðurin Julian Johnsson er í Hull, og tað er eyðsýnt, at venjarin, Brian Little, heldur nógv av føroyska spælaranum.

Síðsta dømið um hetta var leygardagin, tá Hull hevði vitjan av Cheltenham. Julian Johnsson var aftur hesa ferð frá fyrsta bríksli mitt á miðvøllinum. Brian Little skifti tríggjar spælarar út, men Julian var á vøllinum allar 90 minuttirnar.



*Julian Johnsson var á vøllinum allar minuttirnar, tá Hull vann stórsigur leygardagin*

åEingin ivi var um, hvat av liðunum var tað betra. Hull vann 5–1, eftir at støðan í hálvleikinum hevði verið 3–0.

9.435 áskoðarar vóru í Boothferry Park, og lagið var gott á teimum. Hull kom á odda, tá mótstøðumenninir longu í triðja minutti vóru so óhepnir at gera sjálvmál. Hull økti til 2–0 eftir langt fríspark í 22. minutti, teir øktu til 3–0 við stútara, tá 25 minuttir vóru farnir, og so var sigurin vísur.

Tá seinni hálvleikur var 23 minuttir gamal, minkaði Cheltenham um munin, men Hull svaraði aftur í 77. og 81. minutti. Julian Johnsson var ikki millum málskjúttarnar.

## Jákup fer aftur til Molde

**Í gjár gjørdi føroyski landsliðsmálverjin av, at hann fer at halda fram í norska felagnum í tvey ár afturat**

SÁTTMÁLI

*Jóannes Hansen*

Jákup Mikkelsen fer at halda fram at spæla fótbólt í Molde í Noregi. Tað varð gjørt av í gjár:

– Eg havi boðað teimum frá, at eg eri sinnaður at halda fram. Onkrar broytingar eru gjørdar, sammett við sáttmálauppskotið, sum teir spældu út við, og nú flyta vit øll til Molde, sigur Jákup Mikkelsen, sum nú saman við konuni og børnunum báðum fer at fyrireika seg til at flyta.

Í Molde fara teir mánadagin 26. november undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið.

### Kennir korini

Jákup Mikkelsen veit, at hann skal kappast við tveir aðrar málverjar um plássið millum stólparnar á besta liðnum. Talan er um Knud Erik Bakke, sum eitt stutt skifti í summar varð valdur framum Jákup Mikkelsen, og so Eddie Gustafsson, sum er ein góður svenskur málverji.

Ert tú ikki bangin fyri, at tú ein stóran part av tíðini fert at sita á beinkinum?

– Tað eru møguleikar fyri tí, men eg ætli at gera mítt fyri at vinna plássið á besta liðnum. Í so máta havi eg royndir. Tá eg kom til Herfølge, byrjaði eg sum triði málverji, men tað eydnaðist at koma á besta liðið. Á landsliðnum var eg leingi á beinkinum, men tað eydnaðist eisini har at vinna fyrsta plássið, staðfestir Jákup Mikkelsen.

## Teir vita ikki um teir eru keyptir ella seldir

**Meðan Brøndby leggur meiri sjógv millum seg og kappingarneytarnar, vita spælararnir í Lyngby ikki, um teir skulu til arbeiðis í morgin**

SUPERLIGA

*Jóannes Hansen*

Brøndby er flúgvandi. Hóskvøldið komu teir sera sannførandi víðari í UEFA Cup kappingini. Teir nýttu nógva orku í tí dystinum, men teir tóktust heilt væl fyri sunnudagin, tá Vejle vitjaði. Brøndby vann 6–1, og Brøndby misnýtti harafturat eitt brotsspark. Vejle var spælt sundur og saman og hevði púrt einki at siga.

Eisini FCK stóð seg hóskvøldið væl í UEFA Cup. Teir vunnu 1–0 á Ajax í Amsterdam, men tað sást aftur á avrikinum í Odense sunnudagin. Eftir fínt upplegg frá Zuma úr høgra borði fluktaði Thomas Röll til 1–0, tá eitt lítið korter var farið, men átta minuttir fyri hálvleik javnaði fyrrverandi Vejle spælarin, Kasper Dalgas. FCK var leikliga omaná í 1. hálvleiki, men eftir steðgin sóu teir 7.795 áskoðararnir eitt sera væl upplagt heimalið, sum trýsti fyri at fáa sigursmálið, men tað eydnaðist ikki.

FCK málverjin, Magnus Kihlstedt, var orsøkin til útjavnandi málið. Hann sendi eitt málspark í føturnar á Kasper Dalgas, sum takkaði fyri og skoraði. Eftir steðgin bjargaði svenski landsliðsmálverjin væl onkra ferðina.

### Lyngby á tromini

Í Lyngby er lagið ikki gott. Sunnudagin vóru teir í Viborg, og 1–1 úrslitið var einki at siga til. Vónbrotið hjá venjaranum og spælarunum var, tá teir eftir heimkomuna frættu, at nú verður flytingin til og samanrenningin við Ballerup av ongum. Teir í Ballerup hava fingið kaldar føtur, tí skuldin í Lyngby sigst vera størri, enn hon var, tá teir samráddust.

Venjarin og spælararnir hava ikki fingið løn, og tað er mangt, sum bendir á, at felagið fer at snara lykilin um í morgin. Í fyrrakvøldið kom fram, at nú var aftur samband millum Lyngby og Farum. Fyrr í ár vóru viðhaldsfólkini hjá Lyngby sera hørm um hesi tíðindini, men nú tykist tað, sum um møguleikarnir eru færri og smærri fyri á annan hátt at sleppa undan húsagangi.

Fyri at fáa pengar til lønir varð sagt, at Lyngby skuldi selja tveir spælarar til Farum.

### AB fylgir við

Millum feløgini, sum renna aftaná Brøndby, stóð AB seg væl, sjálvt um tað tók sína tíð, áðrenn teir fingu sigursmálið ímóti botnliðnum Silkeborg. Veerjuspælarin Nicolai Stokholm, sum hevur verið í nánd av landsliðnum, skoraði, tá eitt korter var eftir.

AaB og Esbjerg teljast eisini millum næstfremstu liðini. Hesi bæði liðini skuldu spæla í Aalborg í gjárkvøldið. Dysturin varð vístur á TV3+ rásini klokkan 18.00. Sambært heimasíðuni hjá Esbjerg spældi Christian Høgni Jacobsen á næstbesta liðnum í vikuskiftinum.

Tað hevur gingið væl hjá FCM síðstu vikurnar. Sunnudagin høvdu teir vitjan av AGF, sum einki fekk við til hús. FCM vann 2-0. Málini skoraðu teir í 57. og í 63. minutti.

## Óli aftur tryggur úr ellivu metrum

**Hvidovre vann málríka uppgerð og lætti sær eitt sindur á í botninum**

1. DEILD DANMARK

*Jóannes Hansen*

Óli Johannesen kom enn eina ferð á málskjúttaralistan hjá Hvidovre. Tá teir í 2. hálvleiki fingu brotsspark, og støðan var 3–3, vísti komandi B68 venjarin, Frank Skytte, føroyska spælaranum sama álitið, sum hann hevur víst honum fleiri ferðir fyrr í heyst. Óli Johannesen varð settur at skjóta brotssparkið, og royndi stýrimaðurin í verjuni sveik ikki.

Eftir leiðslumálið hjá Óla økti Hvidovre eina ferð afturat og vann harvið 5–3. Teir høvdu annars verið frammanfyri bæði 2–0 og 3–2.

Sigurin hevði við sær, at Hvidovre lætti sær eitt sindur á í botninum í næstbestu deildini.

B93 – sum vit søgdu í síðstu viku, so er Øssur Hansen komin aftur til Føroya – var enn eina ferð fyri ósigri. Teir taptu heili 3–0 á heimavølli ímóti B1913, sum av álvara er farið at blanda seg í oddastríðið. B93 er dygst omanfyri niðurflytingarstrikuna.

Frem hevur fyri stuttum skift venjara. Nýggjur venjari er Ole Mørch, sum var fyrsti venjarin hjá Jákupi Mikkelsen í Herfølge. Síðani fyrrverandi Frem spælarin kom á beinkin í Valby, hevur tað gingið væl. Sunnudagin vunnu teir toppdystin á heimavølli ímóti HFK Sønderjylland 2–1.

Køge er ovast í næstbestu deildini. Teir vóru í Horsens og vunnu 1–0.

Felagið hjá Atla Greggersen, Randers Freja, hevði vitjan av Farum. Peter Brixtofte og teir hava møguleikan fyri samstarvi við Lyngby at hugsa um. At tað endaði málleyst í Randers var neyvan eftir høvdinum hjá teimum í Farum.